# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ódámligur og ólógligur fangaflutningur kannast!

Sendingin hjá DR í gjárkvøldið um fangaflutningin hjá CIA er sera skelkandi. Í áravís hevur CIA í loyndum handtikið og burturflutt fólk, sum eru undir illgruna fyri at stuðla yvirgangi. Handtøkur eru oftast framdar uttan fyri USA í demokratiskum londum, har slíkt virksemi sjálvsagt er ólógligt. Hesi fólk eru so í loyndum við flogførum flutt fyrst til USA og síðan til lond, har loyvt er at nýta pínslu í sambandi við avhoyring. Nógvir av fangunum eru horvnir og uttan iva tiknir av døgum. Sendingin legði fram prógv um, at fangarnir eru fluttir við privatum flogførum gjøgnum eitt nú grønlendskt (danskt) loftrúm eins og flogførini hava millumlent í Grønlandi á veg til loynilig fongsul í einumhvørjum diktaturstati, sum CIA samstarvar við. Hetta virksemið eri ikki bert andstyggiligt brot á allar humanar meginreglur og øll mannarøttindi – hetta er eisini grovt brot á altjóða sáttmálar, sum bæði USA og Danmark vegna alt ríkið hevur samtykt.

Tað má tí vera eitt ófrávíkligt krav, at hetta mál alt fyri eitt verður kannað av almennari og óheftari kanningarnevnd. Landsstýrini í Grønlandi og Føroyum eiga sjálvsagt at verða tikin uppá ráð, tá henda nevnd verður sett. Danska stjórnin hevur áður fingið fyrispurningar um slíkt ódámligt virksemi og tá hevur svarið altíð verið, at stjórnin hevur spurt USA, sum hevur svarað, at einki er í hesum máli. Men nú gongur so sjón fyri søgn og vit mugu og skulu hava alt á borðið og í hesum sambandi eisini svar uppá spurningin, um CIA flogførinin eisini eru farin um føroyskt loftrúm, sum nógv bendir á. Við óvitandi ella vitandi at góðtaka hetta virksemið er danska stjórnin vorðin partur av sera grovum brotum á mannarættindi, altjóða rætt og rættartrygd. Á henda hátt fellur ábyrgdin á allan ríkisfelagskapin í og við, at Danmark hevur evstu ábyrgd av uttanríkis- og verjumálum. Sostatt hava Føroya eisini fingið medábyrgd av hesum rættarbrotum og teimum ómetaligu menniskjansligu ræðuleikum, sum standast av hesum ólógliga virksemi.

Løgting, landsstýri og ikki minst føroysku fólkatingsumboðini kunnu ikki sita hendur í favn, meðan allur demokratiski heimurin øtast yvir hetta ræðuliga mál. Løgting, landsstýrið og føroysku fólkatingsumboðini mugu skjótast taka undir við kravinum um eina óhefta kanningarnevnd. Føroya fólk og tess fólkavaldu umboð kunnu undir ongum umstøðum góðtaka, at gerast partur av hesum ræðuliguleikum. Grønlendingar hava longu gjørt vart við seg og kravt kanning. Vit mugu ikki standa aftan fyri grønlendingar í hesum máli, men skjótast nýta høvið at vísa donsku stjórinin og øllum heiminum, at Føroyar góðtaka ikki, at fólkaræðið verður vart við ódemokratiskum, ólogligum og ómenniskjansligum amboðum. Vónandi fer hetta at vera eitt av fyrstu málunum hjá nýggja løgtinginum og landsstýrinum at taka upp.

**Sosialurin**

## Hevur tú sæð nøkur hagtøl?

NEVNDIN Í BÚK

Gunnar Bjarnason, Kristoffur Hentze og Róar Akralíð

**Hagtalsstøðið í Føroyum er syndarligt og hevur verið tað í mong ár. Niðurraðfestingin av játtanini til Hagstovu Føroya er atvoldin. Politikarar duga ella vilja ikki síggja týdningin av dygdargóðum og tíðarhóskandi hagtølum, men hóast vantandi politiska viljan varð slongt út við búskaparligum hagtølum í farna valdysti.**

Í Føroyum vita vit ikki, hvussu stóran búskaparvøkstur vit hava havt tey seinastu mongu árini. Tey flestu halda tó, at vit hava havt ein høgan búskaparvøkstur seinastu tíðina, tí tey vita, at bæði tey, nábúgvin og vinir hava havt nokk av arbeiði. Tey hava varhugan av, at tað gongur gott. Men eingin kann siga við vissu, um vit veruliga hava havt ein ógvusligan høgan búskaparvøkstur, tí eingi tøl finnast fyri vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) í føstum prísum. Tó kann ein smáfegnast um, at tað hóast alt finnast tøk tøl fyri BTÚ í ársins prísum. Hesi tøl kunnu sjálvandi ikki nýtast til at siga nakað um búskaparvøksturin, men tað ber til at siga, hvussu nógv til dømis vøruútflutningurin fyllir av landsframleiðsluni; ella hvussu høgt skattaprosentið er í Føroyum og okkurt annað lutfall. Men tíverri er tað seinasta tali fyri BTÚ í ársins prísum frá 2003. Hetta kann sostatt ikki nýtast til nakra áleikandi skilgreining. Tað er jú so nógv ár síðani, at alivinnan til dømis er farin á heysin og risin uppaftur í hesum tíðarskeiði… Heldur ikki eru dagførd tøl fyri gjaldsjavnan, sum lýsir okkara viðurskifti við umheimin, tøk. Seinasta talið er frá 2003. Sostatt eru vit óvitandi, um hvussu nógv vit hava keypt frá umheiminum tey seinastu fýra árini. Og í fjør sannaði føroya fólk, at tað ikki ber til at siga, um búskapurin er heitur, tí arbeiðsmarknaðarhagtølini eru ov vánalig. Hetta eru bara nøkur av teimum ógvuliga grundleggjandi hagtølunum, sum vit mangla í Føroyum.

Tað er ræðandi, at slík hagtøl vanta í Føroyum. Vit vita als ikki hvørja kós, vit fara. Vit fáa ikki samanborið okkum við onnur lond. Búskaparfrøðingar fáa ikki givið haldgóð tilmæli. Politikarar fáa ikki mett um gagnið á tí førda politikkinum. Úrslitið er í veruleikanum, at fordómar og uppáhøld hava frítt spæl í Føroyum, tí tey objektivu tølini mangla. Eingin fær prógvað nakað, og eingin fær mótprógvað nakað. Hetta er álvarsamt fyri fólkaræðið, tí ikki ber til hjá veljaranum at meta um útsagnir og vallyfti hjá politikarum. Vit sóu til dømis í júst farna valdysti, at summir flokkar lovaðu meiri vælferð, um búskaparvøksturin verður fimm prosent. Hvussu kann ein flokkur lova slíkt, tá ið vit eingi tøl hava fyri búskaparvøksturin? Hvussu kann veljarin meta, um flokkurin heldur sítt vallyfti? Hevur tú sæð nøkur hagtøl? Ein flokkur segði, at skattalættin í hjá ABC-samgonguni var atvoldin til, at ein milliard var komin aftrat inn í landskassan. Mekanisman er millum annað, at fólk arbeiða meiri, tá ið tey rinda minni í skatti. Flokkurin vildi tískil, at veljarin skuldi taka undir við teirra skattapolitikki. Men tíverri fyri flokkin ber als ikki til at prógva, at hetta var galdandi seinastu fýra árini, tí vit hava eingi góð arbeiðsmarknaðarhagtøl, og tískil vita vit ikki, um arbeiðstímarnir fyri hvønn persón eru øktir tey seinastu árini. Ein skattalætti kann jú líka so gott elva til, at fólk taka sær meiri frí, tí tey varðveita somu inntøku aftaná skatt, hóast tey arbeiða minni – men hetta kann sjálvandi heldur ikki prógvast. Ein annar flokkur segði, at blokkurin var bert fimm prosent av BTÚ í 2007. Tað vita vit ikki. Vit vita, at blokkurin var 615 milliónir í 2007, men vit vita, sum áður skrivað, ikki, hvussu stórt BTÚ var í 2007. Tað fáa vit í fyrsta lagið, við núverandi hagtalskørmum í Føroyum, at vita í 2012… Kanska onkur søgufrøðingur hevur áhugað fyri tølunum, tá ið tey koma.

Ringt er at meta um, hvat er løgnari. At hagtøl, sum ikki eru tøk, verða brúkt í vallyftum og grundgevingum. Ella at somu persónar, sum ikki vilja syrgja fyri, at hagtølini eru tøk, brúka tey í vallyftum og grundgevingum.

Hagtalsstøðið í Føroyum má betrast. Økið má raðfestast munandi hægri, um subjektiv uppáhøld skulu avloysast av siðuligum samfelagskjaki, um dygdargóð búskaparlig tilmæli skulu fáast til vega og hagtøl skulu nýtast í politisku búskaparstýringini. Politikarar áttu at raðfest hetta beinavegin. Hinvegin kann tað sjálvandi enda við, at hetta umsíðir kemur í rætt lag, sum so mangt annað, av eksternum trýstið. Føroyskur limaskapur í EFTA og EBS-samstarv við ES fer jú allarhelst at krevja betri hagtalsgrundarlag, tí ES hevur víttfevnandi hagtalssamstarv við EBS-londini.

**BúK stendur fyri Búskaparfrøðislesandi í Keypmannahavn**

Vøksturin í BTÚ í føstum prísum verður funnin við, at somu vøru- og tænastuprísir (tvs. fastar prísir) verða nýttir í samanberingini av landsframleiðsluni í tveimum árum. Tað vil siga, at tá ið búskaparvøksturin frá 2006 til 2007 skal roknast, skulu prísirnir frá 2006 brúkast, tá ið virðið á framleiðsluni fyri 2007 verður ásett. Brúkaraprístalið hjá Hagstovu Føroya kann ikki brúkast til slíkt, tí tað tekur ikki hædd fyri broytingum í framleiðsluni.

Skattaprosentið verður roknað sum samlaðir skattir býtt við landsframleiðsluni. Hetta er mest nýtti háttur.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.